Álit

í

løgtingsmáli nr. 22/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. og løgtingslóg um viðbót til ávísar pensiónistar (Ásetan av pensjón eftir forvunnari inntøku undanfarnar mánaðir, innvinnan av pensjónsrætti, tillaging av rætti til pensjón í sambandi við deyða o.a.)

Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum, hevur lagt málið fram 30. september 2025, og eftir 1. viðgerð tann 23. oktober 2025 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 4., 6. og 11. november 2025.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista, Áhugabólk pensjónista, Áhugafelagið Antares, Felagið føroyskir fiskimenn uttanlands og landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Eirik í Jákupsstovu.

Um- og eftirrokning í pensjón hevur í mong ár verið ein avbjóðing. Um ein pensjónistur hevur forvunnið hægri inntøku enn væntað í einum ári, verður ikki eftirroknað fyrr enn árið eftir. Tá kemur ofta fyri, at pensjónistar hava fingið stóra rokning, bæði fyri ov nógva útgoldna pensjón og eisini ov nógv útgoldið í viðbót til ávísar pensjónistar.

Øll politiska skipanin hevur ynskt at broytt hetta, men ráðgevingin hevur verið, at tøkni ikki hevur verið til at gera hesar neyðugu ábøtur. Men nú metir Almannaverkið, at tøknin kann verða klár 1. januar 2027. Tí er møguligt at gera hesar broytingar nú, men hesar broytingarnar í lógaruppskotinum kunnu tí ikki koma í gildi fyrr enn í 2027.

Við hesi lógarbroyting verður farið frá at rokna fyri eitt heilt ár í senn til at rokna mánaðarliga. Hereftir verður pensjónin og viðbótin til ávísar pensjónistar roknað mánað fyri mánað.

Skipanin skal nú hvønn mánað hyggja eftir inntøkuni hjá pensjónistinum 12 mánaðir aftur í tíð. Eftir hesum verður pensjónin sett. Hetta kann gera, at pensjónin kann broytast frá mánað til mánað, men tað góða er, at eingin eftirrokning kemur.

Onnur broyting er, at pensjón nú skal verða goldin afturút heldur enn forút. Tað merkir, at í endanum av einum mánaði fær pensjónistur útgoldið fyri júst farna mánaðin. Frammanundan hevur pensjónin verið útgoldin fyri ein mánaða, áðrenn mánaðin byrjar. Flestu starvsbólkar vera í dag løntir afturút. Løgtingsløntir verða tó rindaðar forút, men Løgtingið hevur samtykt lóg, sum ásetur, at eisini løgtingsløntir skulu verða goldnar afturút.

Fyri at lógarbroytingin ikki skal fáa óhepnar avleiðingar fyri verandi pensjónistar, verður hendan nýggja ásetingin bara galdandi fyri fólk, sum fara á pensjón eftir 1. januar 2026.

Fyri nýggjar pensjónistar er tó galdandi, at viðkomandi fær pensjón fyri allan mánaðin, viðkomandi fer á pensjón. So tá ein velur at fara á pensjón, kemur fyrsta útgjaldið, tá hesin mánaði er liðugur.

Í hinum endanum verður ásett, at eingin fær eina rokning eftir deyða. Allir pensjónistar fáa pensjón fyri allan mánaðin, viðkomandi fer her frá. Sostatt fara pensjónistar, sum byrja at fáa pensjón aftan á 1. januar 2026, at fáa útgoldið pensjón í endanum av mánaðinum, tey doyggja.

Verandi pensjónistar hava fingið útgoldið pensjón fyri mánaðin tey fara hiðani, og fáa tí ikki eina útgjalding afturat aftaná deyða. Men eisini er ásett, at um ein doyr í endanum av mánaðinum, t.v.s. longu hevur fingið útgjald fyri næsta mánaðin, so verður hetta ikki kravt innaftur.

Hóast tað er óheppið, at vit við hesum lógaruppskoti fara at hava 3 ymiskar bólkar av pensjónistum, tá talan er um pensjón, so heldur Trivnaðarnevndin, at broytingar eiga at gerast. Tað eru nógvir fyrimunir við omanfyrinevndu lógarbroytingum, sum koma pensjónistum til góða.

Triði partur av uppskotinum snýr seg um persónar, sum arbeiða ella sigla í útlandinum. Verandi lóg ásetur, at persónur, sum býr í Føroyum í 40 ár, hevur rætt til fulla pensjón. Um persónurin hevur búð færri enn 40 ár í Føroyum, verður pensjónin roknað í lutfalli. Hevur persónur búð her í t.d. 20 ár, so fær viðkomandi 20/40 í pensjón, t.e. hálva fólkapensjón.

Fyriliggjandi uppskot ásetur nú aðrar treytir fyri fólk, sum búgva í Føroyum og arbeiða og sigla í útlandinum. Lógaruppskotið ásetur, at persónur, sum býr í Føroyum og arbeiðir og upptjenar pensjón úr útlandinum, skal ikki upptjena pensjón í Føroyum tey árini.

Men sambært lógaruppskotinum er hetta bert galdandi fyri persónar, sum arbeiða ella sigla í landi, sum er fevnt av norðurlendska sáttmálanum um sosiala trygd o.a. Tað merkir, at føroyingar, sum arbeiða í Norra, Svøríki, Finnlandi og Íslandi verða mótroknaðir, meðan hetta ikki verður galdandi fyri arbeiði í nøkrum øðrum landi. Arbeiðir ein t.d. í Danmark ella siglir við t.d. donskum, grønlendskum ella kanadiskum skipi, verður eingin mótrokning.

Nýggja ásetingin rakar serliga hart tey mongu, sum arbeiða í Norra ella sigla við norskum reiðaríum. Hesi rinda til norska Folketrygd, sum er norska pensjónin. Men Folketrygd er at rokna sum persónlig eftirlønaruppsparing. Ein fær út alt eftir, hvussu nógv er goldið inn. Í okkara eftirlønarlóg verður inngjaldið til Folketrygd eisini roknað sum eitt egið eftirlønarinngjald.

Trivnaðarnevndin heldur, at hendan áseting fyri fólk, sum arbeiða í júst 4 útlondum, er óheppin. At so lógaruppskotið eisini er afturvirkandi, er eisini óheppið.

Ein samd Trivnaðarnevnd mælir til at strika ásetingina um mótrokning hjá fólki, sum arbeiða í teimum 4 londunum, sum vit hava norðurlendska avtalu um sosiala trygd við.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 2 verður strikað.
   Nr. 3-19 verða eftir hetta nr. 2-18.

2. Í § 3 verður "§ 1, nr. 5 og 7-11" broytt til: "§ 1, nr. 4 og 6-10".

Viðmerkingar:
Við broytingini verður ongin broyting gjørd í mun til rættin at innvinna dupultan rætt til almannapensjón.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 4. desember 2025

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Jaspur Langgaard
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	